

STARVSFÓLK

# DJÓRALÆKNI TIL BAKKAFROST

Felagið fer at leggja uppaftur størri herðslu á trivnað og heilsu hjá fiskinum, og tí fara vit at seta djóralækna í starv.

**Ábyrgdin hjá viðkomandi verður at:**

- tryggja, at felagið er á odda at byrgja fyri sjúkum
- arbeiða miðvíst við at bøta um fiskaheilsuna
- tryggja at mannagongdir verða fylgdar
- menna nýggjar mannagongdir
- fylgja við viðgerðum

Djóralæknin fer at arbeiða í tøttum samstarvi við alileiðarar og góðskuleiðara og at hava ábyrgdina av veterineru viðurskiftunum hjá felagnum mótvegis myndugleikunum o.a. í hesum sambandi.

**Krøv:**

- Djóralæknaútbúgving
- Góð samstarvsevni
- Fyrimunir at hava royndir við at ala fisk

**Løn og setanartreytir**
Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við avritum av prógvum, CV og viðkomandi skjølum verða send til

**P/f Bakkafrost**
Stílað: Regin Jacobsen, stjóri
Bakkavegur 9
FO-625 Glyvrar

ella við teldubrævi til reja@bakkafrost.com

Umsóknarfreist er 14. november 2010.

**Meira at vita?**
Vilt tú hava meira at vita um starvið, kanst tú seta teg í samband við Regin Jacobsen á tel +298 23 50 01.

Bakkafrost er størsta alifyritøka í Føroyum. Bakkafrost hevur ræði á allari virðisketuni frá smolti til lidna vøru. Bakkafrost virkar m.a. feskan laks til sushimarknaðin og lidnar vørur í verðum til stórar handilsketur. Bakkafrost leggur dent á lívfrøðiliga trygd, dugnalig starvsfólk, lágkostnaðarframleiðslu, virðisøking og vakstrarmøguleikar. Bakkafrost er skrásett á Oslo Børs. Umleið 450 starvsfólk starvast á Bakkafrost.

Bakkavegur 9 · PO Box 221 · FO-625 Glyvrar · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09 · www.bakkafrost.com

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

sansir.fo

Maskinmeistari | Maskinistur | Skipari | Skipsførari

# Spennandi útbúgvingar
## - eitt hav av vinnumøguleikum

**Nýtt skúlaár byrjar 3. januar 2011. Umsóknarfreistin er 1. desember 2010**



**Maskinmeistari**
Maskinmeistaraútbúgvingin er mest fjølbroytta og hægsta tekniska yrkisútbúgving, sum kann takast í Føroyum. Útbúgvingin gevur sera stórar møguleikar, bæði á sjógvi og landi, líkamikið um tað er í Føroyum ella úti í heimi. Maskinmeistaraútbúgvingin gevur eisini møguleikar fyri at blíva elinnleggjari. Eisini í oljuvinnuni eru maskinmeistarar størsti einstaki yrkisbólkurin. Útbúgvingin tekur 3 ár.

Upptøka til maskinmeistaraútbúgvingina verður í januar og í august í 2011.

**Maskinistur**
Maskinistútbúgvingin gevur møguleikar fyri at vera maskinstjóri á flestu veiðuførum, sum fiska á føroyskum sjóøki. Útbúgvingin gevur t.d. eisini rætt til at vera maskinstjóri á skipum við maskinorku upp til 3000 kW í altjóða sigling. Útbúgvingin tekur 9 mánaðir.

Upptøka til maskinist verður í august í 2011. (Umsóknarfreist er 1. juni 2011).

**Skipari**
Vinnuháskúlin bjóðar altjóða góðkendar útbúgvingar til skipara og skipsførara, sum geva vinnumøguleikar á sjógvi og landi um allan heim. Sum skipari kanst tú føra øll fiskiskip um allan heim, eins og farmaskip, upp til 3.000 tons.

Skiparaútbúgvingin tekur hálvtannað ár. Tá ið tú hevur staðið skipara, kanst tú fara beinleiðis til skipsførara.

Upptøka til skipara verður í januar og í august í 2011.

**Skipsførari**
Skipsføraraútbúgvingin tekur tilsamans 3 ár; 3 hálvár til skipara og síðani 3 hálvár til skipsførara. Sum skipsførari kanst tú føra øll skip á øllum hvøvum.

Upptøka til skipsførara verður í januar og í august í 2011.

Maskinmeistara-, skipara og skipsføraraútbúgvingarnar eru moduluppbygdar.

Hevur tú hug at gerast maskinistur, maskinmeistari, skipari ella skipsførari? Set teg so í samband við skúlan, so senda vit tær upplýsingar um upptøkutreytir og lesturin saman við umsóknarblaði.

Umsóknarblað kann eisini heintast á heimasíðu okkara: **www.vh.fo**

VINNUHÁSKÚLIN
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin er ein nútímans skúli við serkønum lærarum í øllum lærugreinum, eins og skúlin hevur allar teir hentleikar og útbúnað, sum skulu til fyri at gera útbúgvingina áhugaverda og góða. Útbúgvingarnar á Vinnuháskúlanum eru góðkendar av Føroya Landsstýri, Søfartsstyrelsen og IMO.

Postboks 104 · FO-110 Tórshavn · Tel 350 250 · Faks 350 251 · info@vh.fo · www.vh.fo

KREA · TEL 60 80 80